Praktiskir praktikantar í praktikk

NANNA JÜRGENS
PRAKTIKANTUR

Seinastu vikurnar hava níggundi flokkarnir í Eysturskúlanum veri› í starvsvenjing, og hetta hevur ført næmingarnar ví›a um í Føroyum. Summi eru farin til Klaksvíkar, onnur til Vágarnar og uppaftur onnur eru farin til skips at royna seg. Meginparturin hevur tó veri› eftir í Havnini.

Desainari

Ein teirra er Rannvá undir Kletti, i› hevur veri› í Vero Moda í SMS at royna handilslívi› har. Hetta hevur dámdi henni sera væl og av tí at hon altí› hevur droymt um at gerast desainari, og eigari av egnum handli, helt hon at hetta mundi vera ta› mest upplagda sta›i› hjá henni at fara.

-Arbei›i hevur veri› eitt sindur strævnari, enn eg hev›i vænta, men eisini meira áhugavert. Eg haldi, eg havi lært nógv um mótan, sum t.d hvørji klæ›ir og litir selja best í løtuni o.s.f. sjálvandi havi eg eisini lært at standa vi› diskin og ekspedera kundar.

Fysioterapeutur

Eisini Frí›a Nolsøe Nielsen hevur n‡tt møguleikan sum starvsvenjingin gevur, til at royna hvussi hennara dreymaarbei›i í veruleikanum er.

-Eg havi altí› veri› hugtikin av arbei›i hjá fysioterapeutum og tí valdi eg fysioterapistovuna Stimbur í Hoyvík sum praktikkpláss. Mær hevur dámd sera væl her og haldi at eg havi fingi› nógv burturúr, eisini er hugurin at gerast fysioterapeut nógv vaksin, sí›ani eg byrja›i.

Apotekari

Ein onnur genta sum eisini hevur fingi› bló› uppá tonnina av at vera í starvsvenjing er Edna Magnussen. Hon hevur sí›stu vikurnar veri› á Apotekinum í Havn, og har er hon sloppin eitt sindur av hvørjum, millum anna› at standa vi› kassan, pakka medicin og annars hjálpt til vi› anna› fyrifallandi arbei›i. Hetta hevur dámd Ednu væl og hon sigur at heilivágsfrø›ingastarvi avgjørt er naka› hon kundi hugsa›, bæ›i tí at ta› er áhugavert og tí at ein sovorna útbúgving kann brúkast til so nógv ymiskt.

Lebastift, maskara og kinnareytt

Tann sí›sta praktikantin, i› vit hava tosa› vi› er Helen Lindenskov Hansen. Hon hevur bæ›i áhuga fyri smyrsli og ø›rum sum kann pynta eitt sní›, samstundist sum hon gjarna vildi arbei›a í onkran handil, tí valdi hon The Body Shop sum praktikkpláss. Her hevur hon lært um kosmetik, bæ›i hvussi ein smyr sær sjálvum og onnur, men kanska serliga um tey evnini i› ska›a náttúruni minst møguligt. Hetta jú er ein av teimum grundleggjandi reglunum hjá handlinum. Annars er tí›in farin vi› at standa vi› kassan og vi› at halda handilin penan og nossiligan.

Starvsvenjing hevur ofta stóran t‡dning fyri framtí›arætlanunum hjá teimum ungu, her fáa tey møguleikan at royna eitt sindur av øllum tí, tey droyma um at sleppa at arbei›a vi›, tá i› tey einafer› vera li›ug vi› skúlan. Nógv ásanna eisini aftaná at lívi› á arbei›smarkna›inum er nógv strævnari enn tey høvdu vænta á›renn tey fóru í starvsvenjing. Hetta kann kanska eisini koma til at vera ein av atvoldunum til, at tey fáa sær eina útbúgving sum tey veruliga hava hug til, í sta›in fyri bert at hugsa um pening.

Helen Lindenskov Hansen t.h.

Rannvá undir Kletti

Frí›a Nolsøe Nielsen


Edna Magnussen

Fjølmi›labreytingar vitja Sosialin

NANNA JÜRGENS,
PRAKTIKANT

Mánadagin 28. septembur fekk Sosialurin vitjan av 14 næmingum, i› ganga í tígginda flokki í Kommunu-, Venjingar-, og Argjaskúla.

Hesir hava øll valt mi›labreytina og sí›stu vikurnar hava tey arbeidd vi› blø›um. Hóast ta› bæ›i var kalt og regni oysti ni›ur uttanfyri, vóru ta› nakrir væluppIagdir forvitnir næmingar, i› hendan morgunin komu inn um gáttina hjá okkum fyri at fáa ein lítlan smakk uppá, hvussu arbei›i› á einum bla›húsi gongur fyri seg.

Jan Müller, bla›stjóri, seg›i frá og svara›i spurningum, sum næmingarnar høvdu fyrireika frammanundan, aftaná vóru tey víst runt á teimum ymisku deildunum og fingu høvi› at tosa vi› starvsfólkini.

Áhugin fyri fjølmi›lunum er altsamt vaksandi, og størvini á tí økinum gerast av somu grund eisini fleiri og fleiri. Hetta er ein av orsøkunum til, at ta› nú longu í 10. flokki er møguligt at velja eina breyt, i› nevnist mi›labreytin. Her læra næmingarnar ymisk um arbei›i, i› liggur aftanfyri at gera t.d sjónvarp- og útvarpsendingar. Og áhugin hevur veri› stórur í ár, eini 30 næmingar úr øllum skúlunum í Havn møtast tveir dagar um vikuna at arbei›a saman vi› ymiskum evnum innan mi›lar.

Næmingarnir settu spurningar og kanska onkur av teimum fer at gerast kend í fjølmi›laheiminum um nøkur ár.

Næmingar úr Venjingar- ,Argja - og Kommunuskúlunum

Fjálga um filmslistina

Nor›urlandahúsi› hevur tiki› stig til n‡tt filmsfelag og tónleikafelag, sum fara at hava ymisk tiltøk í vetur

EY›UN KLAKSTEIN

Tvey n‡ggj feløg sóu dagsins ljós, tá tí›indafundur var í Nor›urlandahúsinum mikudagin. Talan er um eitt filmsfelag og eitt tónleikafelag.

Klipp, sum upplagda navni› á filmsfelagnum er, fer í vetur at vísa sjey nor›urlendskar filmar, og talan ver›ur um filmar, sum hava veri› væl dámdir í okkara grannalondum, og sum venda sær til eina brei›a áskо›arafjøld.

Tónleikafelagi› er doypt Orfeus, og eisini hetta felagi› fer at standa fyri sjey konsertum í vetur - klassiski tónleikurin ver›ur t‡›andi partur av hesum virksemi.



Teir vælumtóktu

Nor›urlandahúsi› hevur í fleiri ár havt hug at gera eitt filmsfelag, og fyrst í oktober ver›ur hetta felagi› veruleiki.

Tá fer› Klipp undir at vísa nor›urlendskar filmar sum Den eneste ene úr Danmark, Fucking Åmål úr Svøríki og Bye Bye Bluebird úr Føroyum. Fyrsti filmurin ver›ur tó tann íslendski Einglar Alheimsins, sum er gjørdur eftir skaldsøgu hjá Einari Már. Hann hevur millum anna› fingi› bókmentavir›islønina hjá Nor›urlandará›num.

Nor›urlandahúsi› ætlar at filmsfelagi› skal vísa filmar, sum kunnu lokka eina brei›a og stóra ásko›arafjøld. Talan ver›ur sostatt ikki um teir meira sermerktu og smalu filmarnar, sum ta› eisini finnast nógvir av í nor›urlondum. Den eneste ene, sum felagi› fer at vísa, var til dømis ein tann mest sæddi filmurin í biografunum í Danmark í fjør.

Lættur klassiskur tónleikur

Orfeus fer eins og filmsfelagi› at leggja seg eftir at røkka eini brei›ari fjøld vi› sínum tiltøkum.

Ta› var sostatt ikki bara kennarar av klassiskum tónleiki, sum fara at fáa naka› burtur úr konsertunum hjá Orfeus, har lættur og áhoyraravinarligur klassiskur tónleikur fer at standa á skránni.

Eitt av endamálunum vi› felagnum er, at føroyskir tónleikarar fáa enn eitt høvi at royna seg.

Orfeus fer at hava sjey konsertir í vetur, og byrja› ver›ur longu komandi hóskvøld.

Bæ›i tá talan er um Klipp og Orfeus ber til hjá fólki at keypa sær atgongumerk til øll sjey tiltøkini fyri 250 krónur. Og eftir tiltøkini hjá feløgunum ver›ur møguleiki at njóta eina løtu í café'ini í Nor›urlandahúsinum.

Helga Hjørvar og Johannes Andreasen eru tvey av høvu›spersónunum aftan fyri n‡ggju films- og tónleikafeløgini. Mynd: Jens Kristian Vang

Sig tað uttan rokning

FøroyaTeletíð konto Sølustøð:

Telebúðirnar hjá Føroya Tele

Tænastumiðstøðin, Tinghúsvegur, Tórshavn
Teldutænastan, Á Hálsi, Tórshavn
Leif Mohr, Tórshavn
Radiohandilin, Tórshavn
Storno, Tórshavn
JS-Radio, Handilskjarnan, Tórshavn
Elding, SMS, Tórshavn
Delta Elektroniktænastan, Tórshavn
Damor, Argir
Sølufelagið, Hoyvík

Contriv, Klaksvík
Elding, Klaksvík

Spf. Joensen, Vágur
ED Joensens Radiohandil, Vágur
Elektronikbúðin v/Paula Poulsen, Vágur

Radiobúðin, Runavík
Elding, Runavík

Kort til FøroyaTeletíð konto Sølustøð:

Posthúsini kring landið
Telebúðirnar hjá Føroya Tele

Bókasølan í SMS, Tórshavn
Føroya Keypsamtøka, Dr. Jakobsensgøta, Tórshavn
Hotel Hafnia, Tórshavn
Kiosk Steinatún, Tórshavn
Kiosk Hornið, SMS, Tórshavn
Kunningarstovan, Tórshavn
Hotel Føroyar, Tórshavn
Kiosk Activ, Tórshavn
Mylnan Bakarí, Tórshavn
Norðurlandahúsið, Tórshavn
Sjómansheimið, Tórshavn
Statoilstøðin í Gundadali, Tórshavn
Sølubúðin á Landssjúkrahúsinum, Tórshavn
Shellstøðin, Norðari Ringvegur, Tórshavn
Shellstøðin, Á Frælsinum, Tórshavn
Statoilstøðin, Argir
Føroya Keypsamtøka, Hoyvík
Shellstøðin, Vestmanna
Statoilstøðin, Kollafjørður

Føroya Keypsamtøka, Klaksvík
Sjúkrahúsið, Klaksvík
Norðoyar Kunningarstova, Klaksvík
Shell Service, Stangavegur, Klaksvík
Statoil Servicemiðstøð, N. Pálsgøta, Klaksvík
Hotel Norð, Viðareiði

Føroya Keypsamtøka, Tvøroyri
Hotel Tvøroyri, Tvøroyri
Fa. Ellen Dahl, v/Solveig Johansen, Vágur
Hotel Bakkin, Vágur

Hotel Vágar, Sørvágur
Kunningardiskurin, Flogvøllurin
Føroya Keypsamtøka, Miðvágur

Runavíkar Sjómansheim, Runavík
Shellstøðin, Norðagøta
Shellstøðin, Oyri
Statoilstøðin, Saltangará
Statoilstøðin, Leirvík
Føroya Keypsamtøka, Saltangará
Føroya Keypsamtøka, Fuglafjørður



FØROYATELE
Tel 30 30 30 • Fax 30 30 31 • www.tele.fo